## Nýggir filmar hesa vikuna

**Støð**
Filmsheiti, **Dagur/ar** ***(klokkutíð)***

**Svf**
- Áðrenn hann vaknar – am. aut. filmur, **25.** ***(21.20)***
- Fort Humboldt – am. Kovboyfilmur, **25.** ***(22.50)***
- Øll siga, eg elski teg – amerikanskur skemtifilmur, **26.** ***(19.45)***
- There's Something about Mary – amerikanskur skemtif., **28.** ***(21.40)***
- It Takes Two – amerikanskur familjufilmur, **29.** ***(18.55)***
- The Birdcage – amerikanskur skemtifilmur, **29.** ***(21.10)***

**3+**
- Biljagtstran á fyrsta klassa, **28.** ***(21:50)***
- Black Scorpion II, **26.** ***(20:45)***
- Excalibur - Svør konganna, **28.** ***(19:00)***
- Gensyn med vennerne, **30.** ***(20:50)***
- Gíðsil í falmmunum, **30.** ***(19:00)***
- Kaðalmaðurin, **31.** ***(21:05)***
- Snýttur av lógini, **27.** ***(20:50)***

**Canal+**
- Another Life, **31.** ***(20:00)***
- Chok 2 - Kjøt, **31.** ***(21:40)***
- Ein heppin nøs, **29.** ***(20:00)*** **31.** ***(13:45)***
- Gullsmiðurin, **26.** ***(20:00)*** **27.** ***(8:30)***
- Tíggju stuttar kærleikssøgur, **30.** ***(20:00)*** **31.** ***(9:00)***
- Ør í Harry, **28.** ***(20:00)*** **29.** ***(11:30)***

**Canal+Gul**
- Gullsmiðurin, **28.** ***(10:20)***
- Ør í Harry, **30.** ***(7:30)***

**DK4**
- Mínir øru dreingir, **27.** ***(20:00)***

**DR 1**
- Bjørnin og Emily, **26.** ***(19:30)***
- Columbo: Hvíl í friði, frøkun Columbo, **26.** ***(21:05)***
- Fangaður í flammunum, **27.** ***(21:00)***
- Herseting úr rúmdini, **28.** ***(20:30)*** **29.** ***(20:30)***

**DR 2**
- Backbeat, **27.** ***(22:50)***
- Company, **31.** ***(22:20)***
- Ein fremmandur uttan navn, **31.** ***(19:50)***
- The Hi-Lo Country, **27.** ***(19:35)***

**Hallmark**
- Case Of The Whitechapel Vampire, The, **27.** ***(22:45)***
- Straight From The Heart, **28.** ***(18:30)***
- The Case Of The Whitechapel Vampire, **27.** ***(3:30)***

**TCM**
- Dreingjabýurin, **28.** ***(15:15)***
- Handan leiktjøldini: Humphrey Bogart, **30.** ***(9:40)***
- Ziegfeld Follies, **29.** ***(11:10)***

**TV 2 zulu**
- Beck - spor í myrkrinum, **30.** ***(19:30)***
- Career Girls, **29.** ***(19:30)***
- Gold Coast, **26.** ***(19:00)***
- Kick, **27.** ***(17:25)***
- Separate Lives, **28.** ***(19:00)***
- Tað byrjaði á Barbados, **31.** ***(11:45)***

**TV 3**
- Kidnappað í paradís, **31.** ***(20:00)***
- Niðurtelingin, **28.** ***(20:00)*** **29.** ***(20:00)***
- Race the Sun, **30.** ***(20:00)***
- Sjakalurin, **26.** ***(23:10)***
- Sum sendur frá himli, **27.** ***(20:00)***
- Twister, **26.** ***(21:00)***

**TV-1000**
- Ace Ventura: When Nature Calls, **28.** ***(19:00)***
- Bubble Boy, **27.** ***(19:00)***
- In the Bedroom, **26.** ***(19:00)*** **30.** ***(21:00)***
- Jarðber við fløta, **29.** ***(19:00)***
- Lítlir detektivar, **26.** ***(15:00)***
- Mindwalk, **31.** ***(19:00)***
- Svarti luftsteinurin, **31.** ***(3:40)***
- Tað tigandi vitnið, **29.** ***(1:00)***

**TVDanmark1**
- Álopið frá tí løttu herdeildini, **27.** ***(21:00)***
- Brúgvin við Remagen, **27.** ***(19:00)***
- Deyðans lækni, **27.** ***(2:20)***
- Ein duftur av kærleika, **28.** ***(20:00)***
- Godfather II - tann síðsti, **29.** ***(20:00)***
- Remo - óvápnaður og vandamikil, **26.** ***(2:30)***
- Rocky III, **26.** ***(21:00)***
- Styrktur illgruni, **31.** ***(20:00)***

**TVDanmark2**
- Babies, **28.** ***(11:20)***
- Ótamdur kærleiki, **30.** ***(11:20)***
- Vill blomstur, **26.** ***(18:55)***

**Fríggjadag 25. kl. 20.00**



### Forever Young
CANAL+
Í 1939 verður daman hjá Daniel yvirkoyrd av einum lastbili og verður sera illa skadd. Læknarnir halda at hon ikki fer at vakna uppaftur. Í sorg meldar Daniel seg til eina roynd, har hann skal niðurfrystast í fleiri ár. Av tilvild vaknar hann í 1992 og hann gerst sjokkeraður, tá finnur útav at daman vaknaði uppaftur í 1944.

**Fríggjadag 25. kl. 20.00**



### Nålens øje
Faber er ein kaldur týskur njósnari, sum virkar í Onglandi undir 2. Veraldarbardaga. Hann arbeiðir fyri sítt elskaða fedraland og einki ella eingin skal standa fyri honum, tá tað ræður um æru Týsklands. Sjálvt ósek lata lív, um tey koma í vegin. D-Dagurin nærkast og tað eydnast Faber at fáa fatur í sera týdningarmiklari vitan.

**Fríggjadag 25. kl. 21.00**



### Riding in cars with Boys
Beverly Donofrio elskar dreingir. Men ikki meiri enn at hon síni fyrivarni. Hon setir seg ofta í teirra bilar. Men teir sleppa ikki nær hennara privatu kropsdeilum. Men tó so hendir undantakið og hon, 15 ára gomul, skal verða mamma.

**Fríggjadag 18. kl. 00.45**



### Fuglarnir
Við Bodega Bay í Kalifornia samlast fleiri og fleiri fuglar av ymiskum sløgum. Fyri fyrst gera fuglarnir ongan skaða og myndugleikarnir halda ikki at fuglarnir eru vandamiklir. Fuglarnir leyp oftari og oftari á og í størri mongdum og brádliga gongur tað heilst galið. Ein rúgva av fuglum leypa á menniskju.

**Leygardag 26. kl. 20.00**



### Gullsmiðurin
CANAL+
Maria og Eddie búgva á einum garði langt burturi frá stórbýnum. Ein dagin kemur ein gamal vinur framvið, Kullman. Skjótt kemur ófriður í forholdið hjá Maria og Eddie og tað verður sett heilt uppá spíssarnar, tá Kullman biðir Eddie um eina tænastu.

**Leygardag 26. kl. 20.45**



### Black Scorpion 2
Friðurin hevur lagt seg yvir Eingalana Bý eftir at løgreglukvinnan Darcy Walker, sum superhetjan Black Scorpion, hevur bankað brotsmenn uppá pláss. Tað gongur ikki leingi fyrr enn hon aftur er noydd at lata seg í hetjuklæðini.

**Leygardag 26. kl. 21.00**



### Rocky III
So er Rocky 3 á skránni. Hann er nú vorðin til eina nógv virdan og sera kendan persón. Hann livir eitt róligt lív við einum góðum hjúnaðarbandi, og tá hann fer í ringin er tað bara fyri at halda seg í form. Á eini stórfingnari móttøku, verður ein stór bronsustandmynd avdúka av Rocky, sum almannakunnger, at hann ætlar at gevast sum nevaleikari.

**Leygardag 26. kl. 21.40**



### Burt Bacharach: This is now
Ein lívlig og undirhaldandi tónleikadokumentar um tann sera fólkakæra Burt Bacharach. 40 ár eftir hittið "Magic Moments", sum Perry Como sang, nú er Bacharach aftur og hevur eina nógv yngri áskoðarafjøld. Eitt heilt nýtt ættarlið av tónleikarum spæla hansara løg í diskotekum og klubbum.

**Sunnudag 27. kl. 16.45**

### Portrett av Gudi
Hvør er Gud? Hvussu sær hann út? Filmsleikstjórin Jon Bang Carlsen roynir at greiða spurningin, menniskjað allar ævir hevur sóknast eftir at vita: Hvør er Gud? Leikstjórin spyr son sín, bussføraran, trygdarvørðin, prestin og onnur.

**Sunnudag 27. kl. 20.00**

### Føroyar í dag — ein ferð aftur í 60'ini
Ein heldur forvitnislig frumsýning av upptøkum, sum Jákup Andreas Arge og danin, Knud Goll, gjørdu fyrst í 60´unum. Filmurin snýr seg um, hvussu tað var í Føroyum tá, og vit verða við røddini hjá Niels Juul Arge, sála, bergtikin borin kring oyggjar og fólk.)

**Sunnudag 27. kl. 20.00**



### Som sendt fra himlen
Henry Biggs er prestur í eini baptistakirkju í einum fátækum býlingi í New York. Hann er trúfastur móti síni samkomu og nærsamfelagnum, men einki er einfalt. Færri og færri koma í kirkju, lítið er av pengum og — enn verri — ognarspekulanturin Joe Hamilton ætlar at keypa kirkjuna, soleiðis at hann kann byggja íbúðir.

**Sunnudag 27. kl. 21.00**



### Traffic
Intensur spenningsfilmur um fylgjurnar av altjóða narkohandli á øllum løgunum — frá framleiðsluni til mørkini kring USA, myndugleikarnar og gerandisdagin hjá misbrúkarinum á gøtuni.

**Mánadag 28. kl. 18.00**



### The Simpsons
Vældámdi og undirhaldandi kult-teknifilmurin við tí gulu familjuni The Simpsons. Frank Grimes er nýsettur í starv á kjarnorkuverkinum og er als ikki nøgdir yvir Homer. Tí, blívir hann sera óður, tá hann fær at vita at Homer faktiskt fær hevur meiri viðgongd enn hann sjálvur hevur.

**Mánadag 28. kl. 18.10**



### Drepandi vápn 3
CANAL+ GUL
Júst sum Murtaugh skal pensionerast enda hann og Riggs í einum harðum stríði móti einum fyrrverandi løgreglumanni, sum nú er blivin til ein brotsmann. Lorna frá "internal affairs" kemur at halda eyga við teir og Riggs dámar hana beinanvegin.

**Mánadag 28. kl. 20.00**



### En duft af Kærlighed
Paul Matthews og Diane Farrow eru tveir dugnaligir biokemikarar, men eisini eru teir tveir nørdar, sum lítið og einki vita um kærleika. Tann smæðni Paul vitjar eina spákonu, Madame Ruth, sum fortelur honum, at hann hevur brúk fyri eini kvinnu. Hon gevur honum kærleikseleksir nr. 8, sum ger tað ómøguligt hjá konufólki at halda sær frá honum.

**Mánadag 28. kl. 21.40**



### There's something about Mary
Tá løgni Ted fyri 13 árum síðani fór í skúlaball saman við dreymagentuni Mary, hendi alt tað, ið ikki mátti henda. Aftan á øll hesi ár er Ted enn skotin í sprundinum Mary, og fær hann detektivin Healy at leita hana upp.

**Týsdag 29. kl. 18.00**



### Spin City
Caitlin finnur kærleikan í nýggja forholdinum við tann eldra Tom, hvør dóttir flirtrar við Charlie. Borgarstjórin er keddur, tað er akkurát eitt ár síðan mamma hanasara doyði. Men Carter introduserar honum fyri Christine, sum fær hann í betri lag.

**Týsdag 29. kl. 21.00**



### Sling Blade
Tann tarnaði Karl hevur verið í næstan 30 ár í einum sinnissjúkrahúsi, eftir at hann drap sína mammu og hennara elskara við einum líggja. Hann roynir at tilpassa seg sjálvan úti í tí fríu verð. Men so møtir hann tí unga Frank, hansara mammu og hennara harðliga sjeiki.

**Týsdag 29. kl. 21.10**



### The Birdcage
Hvar er markið, tá tú skalt tekkjast verforeldrunum hjá soninum? Armand, sum eigur ein náttklubba og livir saman við transvestittinum Albert. Tá sonur Armand fortelur pápa sínum, at han skal giftast við dóttir ein kendan konservativan senator má okkurt serligt finnast uppá.

**Týsdag 29. kl. 21.45**



### Lejemordernes træf
Leigudrápsmaðurin Martin Blank verður útsendur við eini uppgávu í tí lítla staðnum Grosse Pointe. Tessverri, er hann við at fáa ringa samvitsku av arbeiðnum og fær eisini at vit at hansara gamli studentaklassi heldur endursameining í býnum. Trupult er tað hjá honum, FBI er eisini í hølunum á honum.

**Mikudag 30. kl. 18.00**



### The Simpsons
Í einari yvirraskilsisveitslu til heiðurs fyri 20 ára starvsdegnum hjá Seymour Skinner, Skúlainspektøri, verður sanni samleiki Skinners avdúkaður til at vera Armin Tamzarian. Nú stemplaður sum svíkjari tekur hann seg aftur til sín gamla býling í Capitiol City. Gestaframførsla av Martin Sheen.

**Mikudag 30. kl. 20.00**



### Fire on the Amazon
Verkakvinnan Alyssa Rothman ferðast saman við tí illsinta og arroganta myndamanninum, R.J., til amazonfrumskógin í Bolivia, fyri at kannað morðið á tann kenda umhvørvisstríðsmannin Santos. Tað vísir seg at hann hevur roynt at fáa lokalar arbeiðsmenn til at mótmæla niðurrívingini av frumskógini. Hetta hóvar ikki øllum.

**Mikudag 30. kl. 21.00**



### In the Bedroom
Familjan Fowler er ein púra vanlig familja. Foreldrini Matt og Ruth búgva í einum lítlum býi í Maine. Matt er lækni og Ruth er kórleiðari í skúlanum. Sonurin lesur á lærdum háskúla. Alt er friðarligt, men so kemur Frank saman við tí einligu mammuni Natalie, sum ikki er formliga skild enn og brádliga gongur alt ræðuliga illa.

**Mikudag 30. kl. 22.15**



### Katie og kærleikin 1:6
Katie er gift við Matthew, men tá ið hon vaknar undir liðini á besta vinmanninum hjá Matthew, eftir eini nátt í býnm, skulu Matthew og hon skiljast. Men sum frá líður finna tey út av, at tey í grundini hoyra saman. Vinnur stoltleikin ella siga tey hvør øðrum, hvat tey føla?

**Hósdag 31. kl. 18.30**



### Frasier
Roz heldur frí og Frasier fær ístaðin Mary. Hon er smæðin í byrjanini, men tekur næstan púra yvir, eftir eina tíð. Frasier fær næstan ikki orðið upp. Hann skýtur upp fyri Kenny at Mary fær sína egnu sending.

**Hósdag 31. kl. 18.55**



### En familie-hemmelighed
Eftir 2. Veraldarbardaga avgjørdu fleiri av teimum polsku jødunum, sum yvirlivdu holocaust, at stegða einum afturkomandi Hitler, sum fór at hótta teirra familjur við lívinum. Her verða nakrir av teimum 20.000 polakkunum lýstir, sum hava afturfunnið teirra sanna samleika og jødiska arv.

**Hósdag 31. kl. 20.00**



### Another Life
CANAL+
Tann lívsglaða og romantiska Edith kennir seg sum ein fanga í hjúnaðarbandinum saman við sínum ungdómssjeiki, Percy. Hon byrjar eitt forhold við síðuna av, við tí sera forelskaða Freddy, sum er klárur til at gera alt, fyri at oyðileggja hennara trista hjúnarband.

**Hósdag 31. kl. 21.00**



### Hånden på vuggen
Tann vinarliga, vakra og mammuliga barnagentan Peyton Flanders virkar til at vera ein guds gáva til tað unga og lukkiliga parið Michael og Claire Bartel. Men tann snilda Peyton hevur hevnmotivir og ein sorgarleikur hevur gjørt hana mentalt óstøðuga.

**Leygardag 26. kl. 16.00**

### Tilvera: Sólin skínur í trettan mánaðir
Elsa Jacobsen úr Gøtu er útbúgvin sjúkrasystir og jarðamóður. Hon fekk eitt kall at vera trúboðari og hevur í 31 ár arbeitt í Etiopia. Elsa hevur upplivað sera nógv har. Trúarfrælsi var, meðan Hailie Selassie ráddi fyri borgum, men tá kommunistarnir tóku yvir, sluppu trúboðarnir ikki at virka frítt. Andatrúgvin er sterk í Etiopiu, og fólkið hevur nógvar ræðandi siðir. Armgarð Arge hittir Elsu Jacobsen í tveimum sendingum.

**Leygardag 26. kl. 17.00**

### Sjómanssendingin Vitin
Gesturin er Kristoffur Joensen av Argjum. Hann er føddur og uppvaksin í Sørvági, og vit hoyra hann siga frá um barna- og ungdómsárini.
Hann fór ungur til skips og hevur upplivað nógv á havinum. Hann fekk sær konu av Argjum og hevur livað og virkað har síðani.
Hann er ein av teimum fõra sum syngja saman uttan nakað ljóðføri. Árini eru blivin mong, men framvegis er Kristoffur við í tænastuni fyri okkara Harra og Frelsara.

Malmberg Olsen gjørdi samrøðuna. Símin Hansen leggur sendingina til rættis.

**Sunnudag 27. kl. 15.15**

### Ímyndin av øllum møguligum góðum
Triðja sendingin verður um tíðina í Fuglafirði og ótespiligar læknaferðir, tá ansast skuldi eftir brimi, kava og tarvum.

**Ólavsøkuaftan 28. kl. 13.00**



### Eg minnst úr gomlum søgum
Eg minnist úr gomlum søgum, sum Jákup doktari, Jóannes Patursson, Hans Marius Debes og Valdemar Poulsen siga frá, um hendingar o. a. í Havn í gomlum døgum. Her verður sagt frá, tá ið Guttormur í Múla fekk ein hana at bera ein tólvalnastokk, tá Fríðrikkur 7. táverandi prinsur royndi seg sum køstaskoðara, um ommuna, ið fór til Havnar at halda ólavsøku, og hvussu teir telvaðu í Avhaldinum í takt til hornblástur.

Høgni Joensen og Bjørgfinnur Nielsen lesa.

**Ólavsøkudag 29. kl. 15.45**

### Jovina og Lýðar á Ólavsøku
Henda frásøgn er bygd upp av skemtiligum málsligum misskiljingum, og um hvussu ein tufluhetja tíggjar sær, tá konan ikki er í nánd, og hvussu alt tað stuttliga endar við, at Lýðar verður sjubbarður í song av tveimum konum og latin úr næstum hvørjum tráði.

Bjørgfinnur Nielsen lesur og leggur til rættis

## ÍTRÓTTUR

**Leygardag 26.**

**Fótbóltur**, SAS-ligan: Aab - FCK (kl. 15.00)

**Sunnudag 27.**

**Fótbóltur**, SAS-ligan (kl. 16.00)

**Súkkling**, Tour de France

**Golf**, Scandinavian Masters

**Súkkling**, Tour de France
**Fótbóltur**, U-19 EM úr Liechtenstein
**Fótbóltur**, U-18 EM fyri kvinnur úr Týsklandi
**Fótbóltur**, venjingardystir
**Kano**, HM í Slalom úr Augsburg, Týsklandi
**Motorsport**, Super Racing úr Spa, Belgia
**Svimjing**, HM úr Barcelona, Spania
**WTA-Tennis** úr Stanford, USA
**Frælsur ítróttur** úr Linz, Eysturríki

**Súkkling**, Tour de France
**Frælsur ítróttur** úr Linz, Eysturríki
**Badminton**, HM
**Fótbóltur**, venjingardystir

**Mikudag 30.**

**Fótbóltur**, Bayern München - Frankfurt (19.25)

**Golf**, Nissan Irish Open
**Golf**, Greater Hartford Open

VARPIÐ

Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin